# ARBEIÐSEFTIRLITIÐ

*Administration of Occupational Safety and Health*

Falkavegur 6  P.O.Box 1134  FO-110 Tórshavn  Faroe Islands

Tlf. +298 317811  Fax +298 314489  E-mail: info@arbeidseftirlit.fo


*Skrásetingar nr.:*

**R-E012-2**

# Reglugerð um vanda- og trygdarásetingar.

Við grundarlagi í kunngerð nr. E-012-3 frá 13.02.1997 um flokking, innballing, merking, sølu og goymslu av vandamiklum kemiskum evnum og tilfari, hevur Arbeiðseftirlitið, í samstarvi við Apoteksverkinum, tilevna niðanfyri standandi lista við **V**anda- og **T**rygdarásetingum.
Listin verður vanliga dagførdur annað hvørt ár.

***Vandaásetingar:***

| | |
|---|---|
| V1 | Spreingikvæmt í turrum líki. |
| V2 | Spreingikvæmt, um tað fær stoyt, verður gníggjað ella kemur at eldi og øðrum eldkveikjandi. |
| V3 | Sera spreingikvæmt, um tað fær stoyt, verður gníggjað ella kemur at eldi og øðrum eldkveikjandi. |
| V4 | Ger ógvuliga viðkvæmar spreingiligar metalbindingar. |
| V5 | Spreingikvæmt, tá tað verður hitað. |
| V6 | Spreingikvæmt í og uttan luft. |
| V7 | Kann elva til eld. |
| V8 | Eldkvæmt nær eldførum evni. |
| V9 | Spreingikvæmt blandað við eldførum evni. |
| V10 | Eldkvæmt. |
| V11 | Sera eldkvæmt. |
| V12 | Ómetaliga eldkvæmt. |
| V13 | Ómetaliga eldkvæmt flótandi gass. |
| V14 | Virkar ógvusliga í samband við vatn. |
| V15 | Samrennur ógvusliga við vatn, so sera eldkvæmt gass gerst. |
| V16 | Spreingikvæmt blandað við oxiderandi evni. |
| V17 | Sjálvkveikjandi í luft. |
| V18 | Við nýtslu kunna eldførar guvur/spreingikvæmar guvuluftblandingar gerast. |
| V19 | Kann gera spreingikvæm peroxid. |
| V20 | Vandamikið at anda í seg. |

***Lógarheimild:***
Løgtingslóg nr. 70 frá 11. mai 2000 um arbeiðsumhvørvi.
Kunngerð nr. K-E012-2 um evni og tilfar frá 13.02.1997.
Kunngerð nr. E-E012-3 um flokking, innballing, merking, sølu og goymslu av vandamiklum evnum frá 13.02.1997

| *Útgivið fyrstu ferð:* | *Seinastu broytingar:* |
|---|---|
| **1. september 1988** | **07.05.2001** |

***Vandaásetingar:***

| | |
|---|---|
| V21 | Vandamikið fyri holdið. |
| V22 | Vandamikið at fáa niður í seg. |
| V23 | Eitrandi at anda í seg. |
| V24 | Eitrandi at fáa á holdið. |
| V25 | Eitrandi at fáa í seg. |
| V26 | Sera eitrandi at anda í seg. |
| V27 | Sera eitrandi at fáa á holdið. |
| V28 | Sera eitrandi at fáa niður í seg. |
| V29 | Ger eitrandi gass saman við vatni. |
| V30 | Kann gerast ógvuliga eldkvæmt í nýtslu. |
| V31 | Ger eitrandi gass saman við sýru. |
| V32 | Ger sera eitrandi gass saman við sýru. |
| V33 | Vandi fyri hópandi avleiðingum. |
| V34 | Vandi fyri etjan. |
| V35 | Stórur vandi fyri etjan. |
| V36 | Ørkymlar eyguni. |
| V37 | Ørkymlar andingargøgnini. |
| V38 | Ørkymlar holdið. |
| V39 | Vandi fyri ólekjandi skaða. |
| V40 | Vandi kann vera fyri ólekjandi skaða. |
| V41 | Vandi fyri álvarsligum skaða í eyguni. |
| V42 | Kann elva til ovurviðkvæmi, um tað kemur á holdið. |
| V43 | Kann elva til ovurviðkvæmi, um tað verður andað inn. |
| V44 | Spreingikvæmt, um afturlatna ílatið verður hitað. |
| V45 | Kann elva til krabbamein. |
| V46 | Kann elva til brek, sum kunna arvast. |
| V47 | Kann elva til fosturskaða. |
| V48 | Ávirkan í longri tíð kann elva til álvarslig heilsubrek. |
| V49 | Kann elva til krabbamein, um tað verður andað inn. |
| V50 | Sera eitrandi fyri verur, ið liva í vatni. |
| V51 | Eitrandi fyri verur, ið liva í vatni. |
| V52 | Vandamikið fyri verur, ið liva í vatni. |
| V53 | Kann elva til óynskt langtíðarárin fyri vatnumhvørvi. |
| V54 | Eitrandi fyri plantur. |
| V55 | Eitrandi fyri djór. |
| V56 | Eitrandi fyri verur í jørðini. |
| V57 | Eitrandi fyri býflugur. |
| V58 | Kann elva til óynskt langtíðarárin í umhvørvinum. |
| V59 | Vandamikið fyri ozonlagið. |
| V60 | Kann skaða nøringsmáttin. |
| V61 | Kann elva til fosturskaða. |
| V62 | Kann møguliga skaða nøringsmáttin. |
| V63 | Kann møguliga elva til fosturskaða. |
| V64 | Kann skaða bróstabørn. |
| V65 | Vandamikið at fáa niður í seg - kann elva til lungaskaða |
| V66 | Endurtikið árin kann elva til turt og rivið hold |
| V67 | Guva kann elva til dølskni og svimbul |

***Samansettar vandaásetingar:***

| | |
|---|---|
| V14/15 | Virkar ógvusligt í samband við vatn, so sera eldkvæmt gass gerst. |
| V15/29 | Samrennur ógvusligt við vatn, so eitrandi og sera eldkvæmt gass gerst. |
| V20/21 | Vandamikið at anda í seg og fyri holdið. |
| V20/22 | Vandamikið at anda í seg og at fáa niður í seg. |
| V20/21/22 | Vandamikið at anda í seg, fyri holdið og at fáa niður í seg. |
| V21/22 | Vandamikið fyri holdið og at fáa niður í seg. |
| V23/24 | Eitrandi at anda í seg og at fáa á holdið. |
| V23/25 | Eitrandi at anda í seg og at fáa í seg. |
| V23/24/25 | Eitrandi at anda í seg, at fáa á holdið og at fáa í seg. |
| V24/25 | Eitrandi at fáa á holdið og at fáa í seg. |
| V26/27 | Sera eitrandi at anda í seg og at fáa á holdið. |
| V26/28 | Sera eitrandi at anda í seg og at fáa niður í seg. |
| V26/27/28 | Sera eitrandi at anda í seg, at fáa á holdið og at fáa niður í seg. |
| V27/28 | Sera eitrandi at fáa á holdið og at fáa niður í seg. |
| V36/37 | Ørkymlar eyguni og andingargøgnini. |
| V36/38 | Ørkymlar eyguni og holdið. |
| V37/38 | Ørkymlar eyguni, andingargøgnini og holdið. |
| V39/23 | Eitrandi: vandi fyri varandi álvarsomum heilsuskaða, um tað verður andað inn. |
| V39/24 | Eitrandi: vandi fyri varandi álvarsomum heilsuskaða, um tað kemur á holdið. |
| V39/25 | Eitrandi: vandi fyri varandi álvarsomum heilsuskaða at fáa niður í seg. |
| V39/23/24 | Eitrandi: vandi fyri varandi álvarsomum heilsuskaða at anda í seg og at fáa á holdið. |
| V39/23/25 | Eitrandi: vandi fyri varandi álvarsomum heilsuskaða at anda í seg og at fáa niður í seg. |
| V39/24/25 | Eitrandi: vandi fyri varandi álvarsomum heilsuskaða at fáa á holdið og at fáa niður í seg. |
| V39/23/24/25 | Eitrandi: vandi fyri varandi álvarsomum heilsuskaða at anda í seg, at fáa á holdið og at fáa niður í seg. |
| V39/26 | Sera eitrandi: vandi fyri varandi álvarsomum heilsuskaða at anda í seg. |
| V39/27 | Sera eitrandi: vandi fyri varandi álvarsomum heilsuskaða um tað kemur á holdið. |
| V39/28 | Sera eitrandi: vandi fyri varandi álvarsomum heilsuskaða at fáa niður í seg. |
| V39/26/27 | Sera eitrandi: vandi fyri varandi álvarsomum heilsuskaða at anda í seg og at fáa á holdið. |
| V39/26/28 | Sera eitrandi: vandi fyri varandi álvarsomum heilsuskaða at anda í seg og at fáa niður í seg. |
| V39/27/28 | Sera eitrandi: vandi fyri varandi álvarsomum heilsuskaða at fáa á holdið og at fáa niður í seg. |
| V39/26/27/28 | Sera eitrandi: vandi fyri varandi álvarsomum heilsuskaða at anda í seg, at fáa á holdið og at fáa niður í seg. |
| V40/20 | Vandamikið: møguleiki fyri varandi heilsuskaða at anda í seg. |
| V40/21 | Vandamikið: møguleiki fyri varandi heilsuskaða at fáa á holdið. |
| V40/22 | Vandamikið: møguleiki fyri varandi heilsuskaða at fáa niður í seg. |
| V40/20/21 | Vandamikið: møguleiki fyri varandi heilsuskaða at anda í seg og at fáa á holdið. |
| V40/20/22 | Vandamikið: møguleiki fyri varandi heilsuskaða at anda í seg og at fáa niður í seg. |
| V40/21/22 | Vandamikið: møguleiki fyri varandi heilsuskaða at fáa á holdið og niður í seg. |
| V40/20/21/22 | Vandamikið: møguleiki fyri varandi heilsuskaða at anda í seg, at fáa á holdið og at fáa niður í seg. |
| V42/43 | Kann elva til ovurviðkvæmi, um tað verður andað inn og um tað kemur á holdið. |

| | |
|---|---|
| V48/20 | Vandamikið: Ávirkan í longri tíð kann elva til álvarslig heilsubrek, um tað verður anda í seg. |
| V48/21 | Vandamikið: ávirkan í longri tíð kann elva til álvarslig heilsubrek, um tað kemur á holdið. |
| V48/22 | Vandamikið: ávirkan í longri tíð kann elva til álvarslig heilsubrek at fáa niður í seg. |
| V48/20/21 | Vandamikið: ávirkan í longri tíð kann elva til álvarslig heilsubrek at anda í seg og at fáa á holdið. |
| V48/20/22 | Vandamikið: ávirkan í longri tíð kann elva til álvarslig heilsubrek at anda í seg og at fáa niður í seg. |
| V48/21/22 | Vandamikið: ávirkan í longri tíð kann elva til álvarslig heilsubrek at fáa á holdið og at fáa niður í seg. |
| V48/20/21/22 | Vandamikið: ávirkan í longri tíð kann elva til álvarslig heilsubrek at anda í seg, at fáa á holdið og at fáa niður í seg. |
| V48/23 | Eitrandi: ávirkan í longri tíð kann elva til álvarslig heilsubrek at anda í seg. |
| V48/24 | Eitrandi: ávirkan í longri tíð kann elva til álvarslig heilsubrek at fáa á holdið. |
| V48/25 | Eitrandi: ávirkan í longri tíð kann elva til álvarslig heilsubrek at fáa niður í seg. |
| V48/23/24 | Eitrandi: ávirkan í longri tíð kann elva til álvarslig heilsubrek at anda í seg og at fáa á holdið. |
| V48/23/25 | Eitrandi: ávirkan í longri tíð kann elva til álvarslig heilsubrek at anda í seg og at fáa niður í seg. |
| V48/24/25 | Eitrandi: ávirkan í longri tíð kann elva til álvarslig heilsubrek at fáa á holdið og at fáa niður í seg. |
| V48/23/24/25 | Eitrandi: ávirkan í longri tíð kann elva til álvarslig heilsubrek at anda í seg, at fáa á holdið og at fáa niður í seg. |
| V50/53 | Sera eitrandi fyri verur, ið liva í vatni; kann elva til óynskt langtíðarárin á vatn-umhvørvi. |
| V51/53 | Eitrandi fyri verur, ið liva í vatni; kann elva til óynskt langtíðarárin á vatnumhvørvi. |
| V52/53 | Vandamikið fyri verur, ið liva í vatni; kann elva til óynskt langtíðarárin á vatn-umhvørvi. |

***Trygdarásetingar:***

| | |
|---|---|
| T1 | Goymið undir lási. |

| | |
|---|---|
| T2 | Goymið fyri børnum. |
| T3 | Goymið svalligt (8-15 ºC). |
| T4 | Goymið ikki millum hús. |
| T5 | Goymið í ...... (evni, sum framleiðarin sigur frá). |
| T6 | Goymið í ...... (óvirkið gass, sum framleiðarin sigur frá). |
| T7 | Havið ílatið væl afturlatið. |
| T8 | Goymið ílatið turt. |
| T9 | Goymið ílatið á væl luftaðum stað. |
| T10 | Haldið vøruna ráliga. |
| T11 | Latið ikki luft sleppa at. |
| T12 | Latið ikki ílatið tætt aftur. |
| T13 | Goymið ikki saman við føði-, njótingar- og fóðurevnum. |
| T14 | Goymið burtur frá ...... (ósambærligum evnum, sum framleiðarin/virkið sigur frá). |
| T15 | Latið ikki koma at hita. |
| T16 | Haldið burtur frá eldkveikjara. Royking bannað. |
| T17 | Haldið burtur frá eldførum evnum. |
| T18 | Farið væl um ílatið og latið upp við varsemi. |
| T20 | Etið ella drekkið ikki, meðan tygum brúka evnið. |
| T21 | Roykið ikki, meðan tygum brúka evnið. |
| T22 | Andið ikki dustið í tygum. |
| T23 | Andið ikki gass/royk/guvu/aerosol í tygum (framleiðarin sigur frá hvørjum einstøkum navni). |
| T24 | Latið ikki koma at holdinum. |
| T25 | Latið ikki koma í eyguni. |
| T26 | Kemur nakað av evninum í eyguni, skolið væl við vatni og farið til lækna. |
| T27 | Verða klæðini dálkaði við hesum evni, farið tá beinanvegin úr teimum. |
| T28 | Tá tygum hava brúkt evnið ella nomið við tað, vaskið væl við ...... (framleiðarin gevur upp). |
| T29 | Koyrið ikki í frárensl. |
| T30 | Stoytið ongantíð vatn á hesa vøru. |
| T31 | Goymið ikki saman við spreingikvæmum evnum. |
| T33 | Gerið tiltøk móti støðuravmagni (statisk elektrisitet). |
| T34 | Má ikki koma fyri stoyti ella gnígging. |
| T35 | Beinið burtur evnið og ílatið á tryggan hátt. |
| T36 | Nýtið hóskandi verndarbúna. |
| T37 | Nýtið hóskandi verndarhandskar. |
| T38 | Fæst ikki nóg gott luftskifti, brúkið tá andingarverju. |
| T39 | Nýtið verndarbrillur/andlitsverju. |
| T40 | Reinsið gólv og dálkaðar lutir við ...... (evnum, ið framleiðarin gevur upp). |
| T41 | Við eldsbruna ella spreinging, andið tá ikki roykin inn. |
| T42 | Nýtið hóskandi andingarverju, við royking (sproyting við ...... (evnum, ið framleiðarin gevur upp)). |
| T43 | Sløkkið eld við ...... (evnum, ið framleiðarin gevur upp. Um vatn ikki eigur at verða nýtt, verður lagt afturat: "Nýtið ikki vatn"). |
| T44 | Verða tygum ússalig/ur av hesum evni, farið tá til lækna. Havið navnaseðilin á evnunum við, um til ber. |
| T45 | Hendir vanlukka ella verður onkur ússaligur av hesum evni, er læknaviðgerð bráðneyðug. Havið navnaseðilin á evnunum við, um til ber. |
| T46 | Fáa tygum nakað av evninum í tygum, er læknahjálp bráðneyðug. Vísið læknanum ílatið ella navnaseðilin á evnunum. |
| T47 | Goymið ílatið niðanfyri ......ºC (framleiðarin gevur upp). |

| | |
|---|---|
| T48 | Vætið evnið við ...... (framleiðarin gevur upp hóskandi evni). |
| T50 | Blandið ikki saman við ...... (framleiðarin gevur upp). |
| T51 | Gott luftskifti skal verða, har evnið verður brúkt. |
| T52 | Eigur ikki at verða brúkt til størri øki, har fólk býr ella heldur til. |
| T53 | Vara tygum fyri evninum á einhvønn hátt, fá til vega serstakar leiðbeiningar fyri nýtslu. |
| T56 | Lat hetta tilfari og ílatið til eitt innsavningarstað fyri vandamikið burturkast. |
| T57 | Skal innilokast forsvarligt, so sleppast kann undan umhvørvisdálking. |
| T59 | Fá upplýsing um endurnýtslu frá framleiðaranum/útvegaranum. |
| T60 | Hetta tilfar og ílatið skal beinast burtur sum vandamikið burturkast. |
| T61 | Skal ikki leiðast út til umhvørvi. Sí serliga leiðbeining/trygdardatablað. |
| T62 | Hevur ein fingið evnið niður í seg, skal sleppast undan framøsing av spýggju: fá fatur á lækna og vísið ílatið ella navnaseðilin á evnunum. |
| T63 | Hendir vanlukka við at onkur andar evni í seg, skal skaðarakti fáast út í fríska luft og binda frið. |
| T64 | Fær onkur nakað av evninum í seg, so skola munnin við vatni (bert um persónurin veit til sín). |

***Samansettar trygdarásetingar:***

| | |
|---|---|
| T1/2 | Goymið undir lási og fyri børnum. |
| T3/7 | Goymið ílatið væl afturlatið og svalligt. |
| T3/9 | Goymið svalligt (8 - 15 ºC) og á væl luftaðum stað. |
| T3/9/14 | Goymið svalligt (8 - 15 ºC), á væl luftaðum stað og burturfrá ...... (ósambærligum evnum, sum framleiðarin/virkið sigur frá). |
| T3/9/14/49 | Skal goymast í upprunapakningi á svalligum, vælluftaðum stað og burturfrá ...... (ósambærligum evnum, sum framleiðarin/virkið sigur frá) |
| T3/9/49 | Má bert goymast í upprunapakningi á svalligum, vælluftaðum stað. |
| T3/14 | Goymið svalligt (8 - 15 ºC) og burtur frá ...... (ósambærligum evnum, sum framleiðarin/virkið sigur frá). |
| T7/8 | Havið ílatið væl afturlatið og goymið tað turt. |
| T7/9 | Havið ílatið væl afturlatið og goymið tað á væl luftaðum stað. |
| T7/47 | Ílatið skal verða væl afturlatið og skal goymast niðanfyri ......ºC (framleiðarin gevur upp). |
| T20/21 | Etið, drekkið og roykið ikki, meðan tygum brúka evnið. |
| T24/25 | Latið ikki koma at holdinum og í eyguni. |
| T29/56 | Koyri ikki í frárensl. Tilfarið og ílatið skal latast inn til savningarstað fyri vandamikið burturkast. |
| T36/37 | Nýtið hóskandi verndarbúna og verndarhandskar. |
| T36/37/39 | Nýtið hóskandi verndarbúna/-handskar og verndarbrillur/andlitsverju. |
| T36/39 | Nýtið hóskandi verndarbúna, verndarbrillur/andlitsskerm. |
| T37/39 | Nýt egnaðar verndarhandskar og -brillur/andlitsskerm, meðan arbeitt verður. |
| T47/49 | Skal goymast í upprunapakningi og við hitastigi, sum ikki er omanfyri ...... ºC (framleiðarin ella innflytarin sigur frá). |

**ARBEIÐSEFTIRLITIÐ**

Eli Davidsen, stjóri